Fylgiskjal 3

LM-029/2022

Nella Festirstein

Fra: Maria Michelsen
Sendt: 14. september 2022 18:19
Til: Nella Festirstein
Cc: Heri Petersen
Emne: Hoyringssvar - SV: TIL UMMÆLIS. Freist 12. september. Uppskot til løgtingslóg um fylgibroytingar í sambandi við umskipan av Føroya Kærustovni (Avtøka av kærunevndini hjá Arbeiðsloysisskipanini og Barsilsskipanini, Høvuðsbarnaverndarnevndini og Tvi...

Opfølgningsflag: Opfølgning
Flagstatus: Afmærket

Góða Nella

Hervið sum avtalað viðmerkingar frá Almannamálaráðnum til uppskot til løgtingslóg um fylgibroytingar í sambandi við umskipan av Føroya Kærustovni:

- Í § 3, nr. 1 verður yvirskriftin í § 11 í barnavernarlógini broytt til ''Høvuðsbarnaverndarmál''. Mælt verður til, at hetta verður broytt til ''Mál, ið verða viðgjørd av Føroya Kærustovni'' ella ''Mál, ið Føroya Kærustovnur tekur avgerð í'' ella ''Avgerðir, ið verða tiknar av Føroya Kærustovni''. Hetta er grundað á, at Høvuðsbarnaverndarnevndin verður avtikin, og tískil fellur orðið/heitið ''høvuðsbarnaverndar...'' vel eisini burtur. Sostatt verður orðið ''høvuðsbarnaverndarmál'' misvísandi. Orðið ''høvuðsbarnaverndarmál'' verður heldur ikki nýtt Í galdandi barnaverndarlóg ella viðmerkingum.

- Í § 3, nr. 9 verður yvirskriftin til kapittul 8 í barnavernarlógini broytt til ''Høvuðsbarnaverndarmál''. Mælt verður til, at hetta verður broytt til ''Málsviðgerðarreglur fyri mál, ið verða viðgjørd av Føroya Kærustovni'' ella ''Mál, ið verða løgd fyri Føroya Kærustovn sambært § 11'' ella líknandi.

- Í § 52, stk. 6 í barnaverndarlógini verður mælt til, at strika fylgjandi setning ''áðrenn tað verður lagt fyri Høvuðsbarnaverndarnevndina''. Annars fer at standa ''Skrivstovan hjá Føroya Kærustovni ansar eftir, at málið er nóg væl upplýst, áðrenn tað verður lagt fyri Føroya Kærustovn''.

- Í § 5, nr. 3 verður yvirskriftin í § 4 í tvingsilslógini broytt til ''Tvingsilsmál''. Mælt verður til, at hetta verður broytt til ''Avgerðir, ið verða tiknar av Føroya Kærustovni'' ella ''Góðkenning av inntrivi og málsviðgerðartíðir hjá Føroya Kærustovni''. Hetta er grundað á, at yvirskriftin ''Tvingsilsmál'' kann vera misvísandi, tí ásetingin í § 4 snýr seg ikki um tvingsilsmál generelt, men um hvat Føroya Kærustovnur tekur avgerð um (og nær avgerð skal verða tikin).

Sig endiliga til um spurningar eru til viðmerkingarnar.

Vinaliga/Sincerely

Maria Michelsen
Fulltrúi

Almannamálaráðið/Ministry of Social Affairs
Eirargarður 2 • 100 Tórshavn • Faroe Islands